# Fleiri antennir taka ikki Televarpið

**Nú Televarpið er farið at senda, og fleiri fólk hava ognað sær ein av móttakarunum, hevur ein annar trupulleiki stungið seg upp**

TELEVARPIÐ
*Solby A. Eliasen*



*Trupulleiki við antennunum hevur stungið seg upp, nú Televarpið er farið at senda. Tað vísir seg í fleiri førum, at antennurnar ikki megna at taka signalið frá Televarpinum niður*

Aksel Haraldsen, dagligur leiðari á Televarpinum sigur, at tað hevur víst seg, at tær antennurnar, sum fólk hava, í fleiri førum ikki megna at taka signalið frá Televarpinum niður. Fyrst hildu tey á Televarpinum, sum av hesi somu orsøk setti eykafólk inn at arbeiða, at trupulleikin var við teirra skipan. Men tað vísti seg í teimum flestu førunum, at tað vóru antennurnar hjá fólki, sum ikki megna at taka signalið frá Televarpinum, sum sendir frá tí hægra endanum av UHF-bandinum. Tað var ikki ein trupulleiki við Rás Tórshavn, tí hon sendi frá tí lægra endanum.

– Vit hildu, at tær nýggjaru antennurnar, sum fólk hava ognað sær til tess at kunna síggja Rás Tórshavn kundu taka alt UHF bandið í nógv størri mun, men tað hevur so víst seg nú, at tað gera tær ikki, sigur Aksel Haraldsen, sum sjálvandi harmast støðuna. Men hann leggur afturat, at tað kann í flestu førum verða nóg mikið hjá fólki at ogna sær eina inni antennu, tí signalið frá Televarpinum er so mikið sterkt.

Hann sigur eisini, at tey vóru greið yvir, at tað møguliga fór at verða ein trupulleiki við antennunum, men tey vistu ikki av, at trupulleikin fór at vera so umfatandi, sum hann nú hevur víst seg at vera.

Eini gott 500 fólk høvdu inntil mánadagin ognað sær ein móttakara frá Televarpinum, og um vikuskiftið var rættiligur telefonstormur, tí fólk gjørdu vart við, at tey ikki sóu nakað. Televarpið setti eykafólk inn, sum so fóru út til viðskiftafólkini at kanna viðurskiftini, og tað kom so fram, at tað vóru antennurnar í flestu førunum, sum eru trupulleikin.

Aksel Haraldsen ásannar, at hetta er ein strika í rokningini í boðskapinum um at fólk bara nýttust at ogna sær ein móttakara fyri at síggja Televarpið, men nú mugu fólk, sum ikki síggja, so eisini keypa eina antennu.

### Tryggja góða byrjan

Televarpið hevur keypt 5.000 móttakarar inn, og 3.000 eru komnir til landið. Hinir 2.000 koma síðst í árinum. Tað hava tey valt at gera fyri at tryggja eina so góða byrjan sum møguligt.

– Vit hava tí valt fyri fyrst at siga, at hetta er móttakarin, tí vit vita frá kanningum, at hesin virkar til okkara skipan, sigur Aksel, sum tó leggur afturat, at um fólk hava ein nýtiligan móttakara, so kann hann væl nýtast, men haldið má keypast frá Televarpinum.

Hann væntar, at fólk fara at hugsa seg um, áðrenn tey gera av, hvat tey nú vilja síggja, og hvar tey keypa tænastuna.

– Tey eru von við, at tað hevur verið Sjónvarp Føroya og Rás Tórshavn, men nú standa fólk í høvuðsstaðarøkinum við valinum millum parabol og Televarpið. Eg trúgvi tey fara at viga fyrimunir og vansar móti hvørjum øðrum, og síðani taka avgerðina út frá tí, sigur Aksel Haraldsen, dagligur leiðari á Televarpinum, at enda.

## Tað verður munandi lættari



– Tað sigur seg sjálvt, at tað verður munandi lættari at ferðast úr Norðoyggjum vestur á flogvøllin, tá Norðoya tunnilin eisini er komin, sigur Jákup Ziskason, sum ferðast nógv uttanlanda.

Hann vísir á, at nú slepst undan at standa í bíðirøð á Oyrargjógv, og til ta tíð slepst eisini undan tí í Leirvík, so tá fara fólk at vinna nógva tíð í ferðing.

– Um ein skal við flúgvaranum klokkan 11 úr Vágunum, so verður tað ikki neyðugt at fara úr Klaksvík fyrr enn um hálvgum níggju tíðina tá. Sum er noyðast vit at fara klokkan eitt korter til átta, so tað verður bara gott, sigur Jákup Ziskason, sum seinast tá hann var burtur, noyddist heimafturkomin at bíða fyrst á Oyrargjógv ein túr, og síðani yvir tveir tímar eftir Dúgvuni, sum tá vegna veður sigldi á Fuglafjørð.

**-sae-**

## Norðoya tunnil um 2 1/2 ár



– Eg vænti, at eg um 21/2 ár fari at kunna verða vitni til, at Norðoya tunnilin verður tikin í nýtslu, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

Hann vísir á, at álitið um Norðoya tunnilin verður lagt fram í hesi vikuni, og signalini rundan um tað hava verið sera positiv.

– Tí haldi eg, at ein væl kann loyva sær at vera bjartskygdur, tá tað kemur til Norðoya tunnilin, sigur Steinbjørn í stuttari viðmerking. Hann leggur tó afturat, at um tað verður við honum sum borgarstjóra, tað kann tíðin bara fara at vísa.

**-sae-**

## Fyrireika gongutúr undir Leirvíksfjørð




Norðoya Kunningarstova er farin undir fyrireikingar til ein gongutúr undir Leirvíksfjørð, tá Norðoya tunnilin einaferð letur upp.

Frá Kunningarstovuni siga tey, at um tað kemur so langt og tá so tunnilin einaferð letur upp, so verða tey tilreiðar við einum tiltaki líkum tí, sum var í Vágatunlinum sunnudagin. Tað fer at verða eitt tiltak, sum verður fyriskipað í samstarvi við øll ítróttarfeløg í Norðoyggjum.

– Tá tað einaferð kemur so langt, so ganga vit útfrá, at tað verður gingið úr Leirvík í Norðoyggjar, verður sagt frá Norðoya Kunningarstovu.

**-sae-**



# Avloysaraskip fyri Smyril er nú tryggjað

**Suðuroyingar verða ikki aftur við sviðusoð, nú Smyril skal í dokk eftir nýggjár í nakrar vikur**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*



*Tað er nú púra vist, at hetta verður ferjan, sum skal sigla fyri Smyril, tá ið hann fer í dokk í januar. Ferjan lýkur tey krøv, sum Strandferðslan setir og skuldi ikki verið verrið enn Smyril*

Tað er nú heilt vist, at tað verður estlendska ferjan, St. Ola, sum skal sigla fyri Smyril, tá ið hann fer í dokk beint eftir nýggjár.

Fyri nøkrum vikum síðani gjørdi Strandferðslan ávegis avtalu við Estlendska reiðaran um at leiga ferjuna og í farnu viku varð endalig avtala undirskrivað.

Magnus Magnussen, tekniskur leiðari á Strandferðsluni sigur, at manning frá Strandferðsluni fer eftir skipinum ímillum 11 og 21 januar og tá fer hon at sigla fyri Smyril í nakrar vikur ímillum Suðuroynna og Havnina

Strandferðslan kann leiga St. Ola í 75 dagar frá tí at hon kemur og samstundis sum hendan ferjan kemur, fer Smyril í dokk.

Stjórin á Strandferðsluni hevur fyrr upplýstfyri Sosialinum, at estlendska ferjan kostar 6.750 evrur um dagin, tað eru umleið 50.300 krónur í okkara peningi.

Tá er flaggskipari og maskinmeistari við, men allar hinar útreiðslurnar til manning, olju o.a. rindar Strandferðslan.

Tá ið Smyril ferí dokk, verður tað í nakrar vikur, tí arbeiðið er umfatandi, eitt nú skulu ábøtur gerast á stabilisatorarnar, fyri at forða fyri at teir fara so lætt einaferð afturat, og somuleiðis skal nokk so fitt av stáli skiftast.

### Ikki verri enn Smyril

Suðuroyingar hava mangan ilskast inn á tey skipini, sum hava loyst Smyril av, tá ið hann hevur verið í dokk, tí tey hava verið ov vánalig.

Men tað verður neyvan støðan hesuferð, tí St. Ola skuldi ikki verið verri skip enn Smyril og hon lýkur øll tey krøv, sum Strandferðslan setir til eina slíka ferju.

Hon hevur siglt í fastari rutu ímillum Scrabster og Stromness á Orknoyggjum og tað er minst líka ringt sum í Suðuroyarfirði og ferjan er gjørd hareftir.

Hon er smíðað í 1971 og hon hevur stabilisatorar bæði aftan og framman .

Hon siglur 16 míl, hon tekur 120 bilar og 500 fólk, hon er góðar 86 metrar long og góðar 16 metrar breið, so munurin ímillum hana og Smyril er ikki stórur.

# Stabilisatorarnir á Smyrli virka aftur sum tær eiga

**Nógv aftra seg við at fara við Smyrli tí tað er komið út í orð, at stabilisatorarnir ikki virka, men tað er ein misskiljing**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*



*Smyril hevur mangan brattan farið síðani hann kom til landið í 1975. Men seinastu tíðina hevur verið verið serstakliga ólagaligt, so tað hevur mangan verið ófantaligt. Hesa myndina tók Leivur Nygaard av Smyrli á veg út av Trongisvágsfirði nú ein dagin í heyst. Myndin talar fyri seg, men stabilisatorarnir virka sum teir eiga og í so ringum veðri slepst ikki undan rulli*

Seinastu vikurnar hevur veðrið verið skubbut. Tað hevur ikki minst ferðafólkið við Strandferðsluni ásannað.

Ikki minst hevur Smyril havt nakrar ófantaligar ferðir ímillum Havnina og Suðuroynna og ta einu ferðina fór ein lastbilur á dekkinum á glið og gjørdi eitt sindur av skaða frá sær.

Tá var okkurt galið við stabilisatorunum, so at bara tann eini virkaði. Og síðani er vanliga fatanin, at brekið ongantíð er rættað og at Smyril framvegis bara siglur við einum stabilisatori.

Men hetta er skeivt, sigur Magnus Magnussen á Strandferðsluni.

Hann sigur, at bæði umborð á Smyrli og á Strandferðsluni annars, frætta tey javnan frá fólki sum kæra seg um, at stabilisatorarnir ikki virka og tey frætta eisini frá fólki sum rætt og slætt setast aftur av tí sama, tí tey halda, at Smyril rullar nógv verri enn hann plagar.

Men Magnus Magnussen sigur, at brekið varð rættað stutt eftir ferðina, tá ið lastbilurin fór á glið.

–Fólk skuldi koma uttaneftir at rættað brekið og nú er nakað síðani, at maðurin kom og tá varð brekið rættað. Tað er nú ein mánaði síðani, at brekið varð rætta.

Sostatt virka stabilisatorarnir á Smyrli sum teir eiga, so tað skal ikki vera orsøk til at setast aftur, tí hann rullar ikki verri enn hann plagar, sigur Magnus Magnussen.

Hann sigur, at eitt heilt annað er, at veðrið hevur verið ógvuliga ringt at kalla í fleiri vikur út í eitt og at tað tí hava verið nógvar ringar ferðir um Suðuroyarfjørð, hóast stabilisatorarnir virka, sum teir eiga.

# Økt samstarv ímillum kommunur í Suðuroy

**Kommunurnar í Suðuroy ætla nú at seta felags verkfrøðing fyri alla oynna**

KOMMUNALT SAMSTARV
*Áki Bertholdsen*

Hvørja ferð tær flestu kommunurnar í Suðuroy hava tekniskar trupulleikar av týdningi, noyðast tær norður um fjørð fyri at fáa teir loystar.

Vágs Kommuna er nevniliga einasta kommuna í oynni, sum hevur verkfrøðing. Men tað er mangan brúk fyri verkfrøðingi til alskyns uppgávur, men tað er ein tvørleiki, at ongin er í oynni.

Borgarstjórarnir í oynni hittast av og á at tosa leyst og fast um ymisk viðurskifti í oynni. Og á einum av hesum fundum varð trupulleikin, at oyggin er so illa stødd við verkfrøðingum, umrøddur.

Men tað vísir seg heldur ikki at vera lætt at fáa verkfrøðing í oynna.

Eitt nú hevur Tvøroyrar Kommuna søkt eftir býarverkfrøðingi, men ongin søkti.

Finnleif Guttesen, borgarstjóri á Tvøroyri, sigur, at kommunurnar eru tí samdar um at søkja eftir verkfrøðingi í felag.

Hetta verður ein verkfrøðingur, sum allar kommunurnar skulu brúka, tó at Vágur ikki verður so nógv uppi í av tí at hon hevur sín egna verkfrøðing.

Borgarstjórin á Tvøroyri sigur, at ætlanin er at søkja eftir einum verkfrøðingi, sum skal arbeiða sjálvstøðugt.

Hinvegin skulu kommunurnar í oynni binda seg til at brúka hann eitt ávíst tímatal so at honum altíð er tryggjað nóg mikið av arbeiði.

## Borgarstjórin í Havn ósamdur við yvirskriftina

RÆTTING
*Áki Bertholdsen*

Í Sosialinum í gjár hava vit samrøðu við borgarstjóran í Havn um viðurskiftini í millum Havnina og Kollafjørð eftir at báðar kommunurnar vórðu lagdar saman.

Undir yvirskriftini " Hol í høvdið at tey eru misnøgd í Kollafirði" lótu vit borgarstjóran vísa á, at hann hann helt ikki, at atfinningarnar ímóti býráðnum vóru rættvísar.

Jan Christiansen heldur, at yvirskriftin kann tykjast eitt sindur niðurgerandi og tað avgjørt ikki var ætlanin hjá honum. Men hann leggur afturat, at hann heldur framvegis, at misnøgdin hjá kollfirðingum er ógrundað og tað var hetta, hann greiddi frá í blaðnum - og greinina annars er hann væl nøgdir við.